

# Uppsøgd í oljuvinnuni gerast íverksetarar hjá alivinnuni

**Jógvan Hugo Gardar**

26.04.2015 - 14:44

Oljan.fo

Minkandi virksemi í oljuvinnuni, og fleiri sum missa arbeiði í hesi vinnuni, ávirkar nú alivinnuna á ein jaligan hátt. Íversetaraumhvørvini í Vestur-Noregi uppliva nú at fólk sum hava havt arbeiði í oljuvinnuni ynskja at gerast íverksetarar í alivinnuni.

Avisa Nordhordland hevur tosaðvið Børge Brundtland hjá Industriutvikling Vest, og hann váttar at tey hava havt metnógv sum hava verið og spurt um hjálpt til at koma í gongd sum íverksetarar. Hann sigur at so leingi sum fólk hava eina trygga inntøku, so er lítil hugur til at royna nakað nýtt, men nú er gongd komin á uppfinnarahjørtuni.

Brundtland sigur at nógv sum tey tosa við eru send heim frá verandi arbeivsgevara, og tað røkist ikki fyri at tey fáa arbeiðið aftur.

Hann sigur at tey sum nú seta seg í samband við tey kunnu býtast í tveir bólkar. Nøkur ynskja at halda fram við tí tey hava gjørt, men nú vilja tey byrhja fyri seg sjálvi. Hin bólkurin kann kallast íverksetarabólkurin sum ynskir at brúka kunnleikan fra oljuvinnuni til at skapa nýggjar loysnir sum kunnu brúkast innan alivinnuna